# um skúla



## við teim flatu viðingunum

Sum er hava tær í Ósáskúlanum ein lítlan garð aftan fyri skúlan at nýta í fríkorterunum. Men hetta er ikki nóg mikið.

Teirra ynski er at fáa ein størri garð, har allir teir eldru næmingarnir úr báðum skúlunum kunnu vera saman hesar løturnar. Ella hví ikki bara sláa báðar framhaldsdeildirnar saman í eina?!

Í dag eru næmingarnir hvør sær, og tað halda tær átta vera stórt spell, tí so kemur ein ikki altíð so nógv í samband við hinar næmingarnar.

Millum næmingarnar á Ziskatrøðni eru næmingarnir norðanfyri – tað vil m.a. siga úr Hvannasundi og Viðareiði.

– Tað hevði verið ordiliga cool við eini felags framhaldsdeild. So komu vit eisini betri at kenna viðingarnar og sundafólkini.

– Tey eru so herlig har norðuri. Tað er so skeg at hoyra viðingarnar við teirra flata máli, sigur ein teirra, og allar hinar sjey bresta út úr at flenna.




*Borgarstjórin, Malena Thomsen vísir á, hvat tey 24 grundøkini skulu liggja. Neyðugt er helst at fyrireika enn eina útstykking, tí 27 umsóknir eru til hesi 24 grundøkini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Einki er sum at búgva á Strondum

**Tað vóru kanska tey sum hildu, at Sjóvar kommuna so líðandi fór at minka, eftir at Norðskálatunnilin lat upp og øll ferðslan fór tann vegin.**

**Støðan í dag er heldur tann øvugta: Fólk vilja fegin búgva og byggja á Strondum – eisini fólk úr øðrum býum og bygdum!**

GRUNDØKI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Strendur:** – Okkara hægsta ynski er fáa góð livilíkindi her á Strondum, sigur borgarstjórin Malena Thomsen.

At tað veruliga er so, prógvar tann seinasta útstykkingin hjá kommununi. Hon er í roynd og veru longu ov lítil.

Hetta eru sum vera man góð tíðindi fyri tey, ið vara av kommununi her uttast á vestara armi á Skálafjørðinum.

Hinvegin so er alt sum bendir á, at trýstið og eftirspurningurin eftir grundøkjum kann gerast uppaftur størri í framtíðini, tá ætlaði undirsjóvartunnilin millum Streymoynna og Eysturoynna verður framdur í verki.

Tí ynskir kommunan at vera ein kommuna sum kann taka sær øllum borgarunum í kommununi. Í dag eru tí ein dagstovnur í gerð, skúlin skal útbyggjast munandi, eins og ætlanir eru frammi um eitt sambýli í kommununi.

### Hækka skattaprosentið

Til tess at nøkta eftirspurningin eftir grundøkjum hevur kommunan í eina tíð arbeitt við at fyrireika eina rættiliga umfatandi útstykking á einum staði í bygdini tey nevna í Lánni.

Eftir hesi ætlan skulu útvegast 24 grundøki. Hóast hetta kann tykjast sum eitt stórt tal, so er alt sum fara at hugsa um enn eina útstykking.

Ein sannroynd er í øllum førum at umsóknir eru til øll hesi 24 grundøkini, - í roynd og veru til enn fleiri.

– Nei, vit høvdu ikki væntað so stóran áhuga, sigur Malena Thomsen.

Ætlanin er nú at fyrireika hesa útstykkingina í Lánni, soleiðis at tey fyrstu grundøkini kunnu verða seld komandi ár.

Umframt hesa útstykkingina hevur kommunan aðrar stórar ætlanir tey næstu árini. Og hetta hevur so – hinvegin – gjørt tað neyðugt hjá kommununi at hækka skattaprosentið úr 18 upp í 21,5.

– Hetta er ikki nakað vit eru errin av. Men hetta er kortini neyðugt til tess at kunna fíggja allar hesar íløgurnar, sigur borgarstjórin.

**FAKTA**

**Skattur og fólkatal**

Skattainntøkan hjá Sjóvar kommunu var í 2005 uppá 19,4 mió. kr. Við ársbyrjan vóru 1038 fólk í Sjóvar kommunu.
Í Sjóvar kommunu eru bygdirnar: Innan Glyvur, Strendur, Kolbeinagjógv, Morskranes og Selatrað.
Samlaða víddin av Sjóvar Sókn er 33,33 ferkilometrar.